# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 25. november 2009



Birgir Hansen er ikki longur partur av venjaratoyminum hjá H71. Vantandi hugburður millum spælararnar er høvuðsorsøkin til avgerðina, sigur hann

# Spælararnir vilja ov lítið

**Vantandi hugburður millum spælararnar er høvuðsorsøkin til, at Birgir Hansen hevur tikið avgerð um at gevast sum venjari hjá H71**


einslistir@kallnet.fo



Hilmar Jan Hansen


Alt var gaman í vár, tá H71 vann sítt fyrsta FM-heiti í manshondbólti. Við hesum høvdu venjararnir báðir, Birgir Hansen og Kári Nielsen, fingið krúnuna á sítt verk, og hóast frágongd av sterkum profilum, so varð roknað við, at unga H71-liðið aftur í ár skuldi blanda seg millum tey bestu.

Enn er tann parturin ikki liðugt skrivaður, men hoyvíkingar hava ikki á sama hátt sett dagsskránna, og tað hevur eftir øllum at døma skapt ónøgd.

Og í gjár tók annar av venjarunum, Birgir Nielsen, avleiðingarnar av hesum.

- Hugurin at halda fram í starvinum var ikki til staðar. Og tá eg fyrst var komin til ta niðurstøðuna, helt eg tað vera best, at eg alt fyri eitt gavst í starvinum, segði Birgir Hansen við portalin í gjárkvøldið.

Um orsøkina til hetta sigur Birgir, at har vóru nøkur viðurskifti, sum hann ikki var heilt nøgdur um.

- Eg haldi ikki, at spælararnir veruliga hava víst tað, sum krevst í vetur. Kanska er talan um okkurt slag av mettu, eftir at liðið í vár vann FM-heitið. Í øllum førum hevur hetta ikki verið nøktandi, og so havi eg tikið avleiðingarnar, sigur Birgir.

Kári Nielsen, sum saman við Birgiri hevur vant H71, heldur fram í sínum starvi.

Í løtuni veit Birgir ikki, hvat framtíðin hevur at bjóða á hondbóltsøkinum.

- Her og nú fari eg bara at taka mær av løttum. Og tað hevur í øllum førum verið stuttligt, at eg í kvøld havi hugt eftir einum heilum dysti í Champions League. Tað havi eg ikki havt møguleika til í fleiri ár, sigur hann.

# Síðstu dystirnir í kvøld

**Freistin at spæla dystirnar í øðrum umfari í steypakappingunum hjá kvinnum og monnum er úti í kvøld. Enn restar ein dystur í hjá kvinnunum og fýra hjá monnunum**

Steypakappingin hjá bæði kvinnum og monnum, Coca-Cola kappingin, skuldi nú verið komin so mikið áleiðis, at farast kann undir triðja umfar, sum skal verða avgreitt áðrenn mikudagin 2. desember.

Hjá kvinnum vann Kyndil 29-22 á Tjaldri II í fyrsta umfari og kom beinleiðis í fjórðingsfinaluna. Í hinum dystinum í fyrsta umfari vann Søljan 25-19 á Neistanum og skal í øðrum umfari spæla ímóti VÍF 2 um enn eitt fjórðingsfinalupláss.

Tað vil siga, at Kyndil og vinnarin av Søljan-VÍF II koma í fjórðingsfinalurnar, har tey seks liðini í Sunset-kappingini síðani koma upp í steypakappingina.

## Fýra dystir eftir

Hjá monnunum var bara ein dystur í fyrsta umfari, og tá vann Team Klaksvík 32-26 á Neistanum II og kom víðari til annað umfar, sum eftir skránni skal verða liðugt spælt í síðsta lagi í kvøld.

Higartil eru tó bara tveir av teimum seks dystunum spældir, og har vann VÍF I 36-28 á H71 I, og H71 II vann 29-26 á StÍF I. Men framvegis eru hinir fýra dystirnir ikki spældir, og teir eru hesir: VÍF II-Neistin I, EB-GÍ, StÍF II-Kyndil I og Team Klaksvík-Kyndil II.

Onkrir av hesum vinnarunum koma beinleiðis í fjórðingsfinalurnar, meðan aðrir mugu spæla triðja og fjórða umfar, áðrenn teir koma í fjórðingsfinalurnar, har tey seks liðini í Atlantic Airways-kappingini koma upp í steypakappingina.

Teir næstu steypadystirnir verða nokk so tættir, tí fjórða umfar skal spælast innan mikudagin 9. desember og fjórðingsfinalurnar innan mikudagin 16. desember. Lutakastið um, hvussu mansliðini møtast í fjórðingsfinalunum, verður 7. ella 8. desember.

hil